# ítróttur

Nr. 22 • mikudagur • 2. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## John tvífaldur málskjútti

**John Petersen royndist væl í fyrsta venjingardystinum hjá nýggja liði sínum, Holstebro, sum leygardagin vann 5-3 á Nørresundby. Tvær ferðir sendi John bóltin í netið hjá Nørresundby**

ÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Herfyri gjørdi fyrrverandi føroyski landsliðsleikarin John Petersen sáttmála við danska 2. deildarfelagið Holstebro Boldklub, vanliga stytt HB, og í fyrsta venjingardysti sínum skoraði skálamaðurin tvær ferðir.




*John Petersen skoraði tvær ferðir frá brotsteigarblettinum, tá ið Holstebro leygardagin vann 5-3 á Nørresundby í venjingardysti.*
*Mynd: www.holsteboboldklub.dk*

### Legði eisini upp

John Petersen byrjaði á beinkinum, tá ið Holstebro leygardagin spældi venjingardyst móti Nørresundby, ið til dagligt spælir í Danmarkarseriuni. Í hálvleikssteðginum, tá ið Holsterbro var aftan fyri 1-2, bleiv John settur á vøllin. Holstebro javnaði til 2-2, longu tá ið tveir minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, og løtu seinni gjørdi John vart við seg. John gjørdist leysur í vinstru síðu av brotsteiginum hjá Nørresundby, men beint tá ið hann skuldi skjóta, bleiv John feldur. Dómarin ivaðist ikki og dømdi brotsspark, og tað setti John sjálvur í netið til 3-2 til Holstebro. Løtu seinni fekk Holstebro aftur brotsspark, og aftur hesaferð var John tryggur frá elllivu metrum, og so var 4-2. Heimaliðið økti eisini til 5-2 við einum sjálvmáli, sum John eisini átti sín leiklut í. Móti endanum av dystinum fekk Nørresundby pyntað um úrslitið, tá ið teir minkaðu til 3-5.

Sostatt kann ikki sigast annað, enn tað gekk væl hjá John í fyrstu dystarroyndini hjá sær í Holstebro.

## Norsk HM-sensatión

**Norsku hondbóltsmenninir, sum føroyska landsliðið dystaðist við herfyri, sygrdi mánakvøldið fyri mest óvæntaða úrslitinum higartil í HM-endaspælinum í Tunis, tá ið teir vunnu á olympisku meistarunum og heimsmeistarunum úr Kroatia**

HM-SENSATIÓN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Norðanlond eru væl umboðað í HM-endaspælinum í manshondbólti, sum í hesum døgum er í afrikanska landinum Tunis. Ísland, Danmark, Noreg og Svøríki hava øll tikið lut í kappingini, men eftir bólkaspælið eru bæði íslendingar og danir sendir heim aftur, tí teir ikki hava staðið seg nóg væl. Svøríki tykist eisini at hava spælt sær av við sínar møguleikar, og tí er tað upp til normenn at verja norðurlendska heiðurin.

### Vunnu á heimsmeistarunum

Mánadagin vóru fyrstu dystirnir í millumspælinum spældir, og normenn høvdu fingið ein ordans avbjóðing, tí teir skuldu dystast við verjandi heimsmeistararnar og olympisku meistararnar úr Kroatia, sum høvdu vunnið allar dystirnar í kappingini higartil.

Norsku menninir tóku dystin upp við kroatarnar, og við einum mannfólkaavriki syrgdu teir fyri mest óvæntaða úrslitinum higartil, tá ið teir vunnu 28-25 í einum sera spennandi dysti.

Rómurin á norsku spælarunum og áskoðarunum aftaná dystin var øgiligur, og rópini frá frásøgumonnunum hjá norska sjónvarpinum mintu ikki sørt um, tá ið norska fótbóltslandsliðið á sinni vann á Onglandi á Wembley.

Í gjárkvøldið skuldu normenninir so aftur í eldin, og hesaferð var mótstøðuliðið grannarnir úr Svøríki. Um Noreg vann tann dystin, er møguleikin hjá teimum fyri at røkka einum hálvfinaluplássi heilt góður, og tað hevði verið eitt ógvuliga óvæntaða úrslitið, um normenn røkka so langt í HM-endaspælinum.




*Johnny Jensen, ið her er avmyndaður í dysti móti Føroyum á Hálsi, og hinir á norska landsliðnum, syrgdu fyri einari rættari sensatión í HM-endaspælinum, tá ið teir bastu olymipsku meistarunum úr Kroatia.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Todi aftur í byrjunar uppstillingini

**Todi Jónsson var mánakvøldið aftur millum teir fyrstu ellivu hjá FC Keypmannahavn, sum vann 1-0 á norska Vålerenga í venjingardysti í Spania**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mánakvøldið spældi FC Keypmannahavn sín næsta venjingardyst á venjingarlegu síni í tí fyri føroyingar so kenda La Manga frítíðarstaðnum í Spania. Mótstøðuliðið var norska Vålerenga, og donsku meistararnir vunnu dystin 1-0 við einum máli frá innskifta Jesper Bech.

### Saman við Zuma

Eins og í dystinum móti russiska Lokomotiv Moskva í vikuskiftinum var Todi Jónsson millum teir fyrstu ellivu, ið fóru á vøllin fyri FCK, og aftur hesaferð myndaði Todi álopið saman við suðurafrikanska Sibousisu Zuma teir fyrstu 45 minuttirnar.

Hálvleiksstøðan var javnleikur 0-0, og í steðginum valdi svenski venjarin hjá FCK, Hans Backe, sum vanligt er í slíkum venjingardystum, at skifta meginpartin av liðnum hjá sær út, íroknað Toda Jónsson.

Eftir steðgin fekk FC Keypmannahavn so einsamalla málið í dystinum, sum innskifti Jesper Bech syrgdi fyri. Seinasti venjingardysturin hjá Toda Jónsson og FC Keypmannahavn á venjingarleguni á La Manga verður í morgin, tá ið mótstøðuliðið verður norska meistaraliðið Rosenborg.